


# Nýggir langtíðarsáttmálar til Skansi Offshore

Deil:

**Jan Müller**

04.11.2014 - 11:17

Oljan.fo

Skansi Offshore hevur gjørt nýggjar avtalur fyri Sjoborg og Eldborg.

Det norske oljeselskap hevur tillutað Skansi Offshore ein sáttmála fyri skipið “Sjóborg”.

Sáttmálin byrjar eftir ætlan í desember, og er fyri eitt ár fast, við møguleika fyri at leingja upp til 3,5 ár.

Skipið arbeiðir í løtuni fyri ExxonMobile, men hevur fyri tað mesta arbeitt fyri Statoil, síðan tað var leverað í 2012.

Norske Shell hevur tillutað Skansi Offshore ein sáttmála fyri skipið “Eldborg”.

Sáttmálin er fyri ein mánað fast við møguleika at leingja upp til 7 mánaðir. Sáttmálin byrjaði í oktober 2014.

Eldborg hevur seinastu tíðina arbeitt fyri Statoil í Mozambique og Tanzania sigur Skansi Offshore í tíðindaskrivi.